Runavíkar Kommuna

Boks 139 · Heiðavegur 26 · FO-100 Saltangará
tlf 417000 · runavik@runavik.fo · www.runavik.fo

# Økispedagogur og Dagrøktarar til Dagrøktina í Runavík

**Dagrøktin í Runavík**
Í dagrøktini starvast 20 dagrøktarar, økispedagogur, umframt leiðari og varaleiðari. Spælistova er knýtt at dagrøktini.

**Søkt verður eftir økispedagogi, 30 tímar um vikuna at byrja 01.03.2008 ella skjótast gjørligt**

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.**
- At vitja dagrøktarheim, veita ráðgeving og hava eftirlit
- At skapa eitt mennandi umhvørvi í spælistovuni
- At virka fyri, at starvsfólk trívast og mennast
- At tryggja námsfrøðiliga tilboðið eftir tørvinum hjá tí einstaka barninum og teimum treytum sum skipanin virkar undir

**Vit leita eftir fólki, ið**
- Er útbúgvin pedagogur ella hevur aðra viðkomandi útbúgving
- Hevur góð samstarvsevni
- Er nýhugsandi og ígongdsetandi
- Kann arbeiða sjálvstøðugt

**Søkt verður eftir dagrøktarum at byrja 01.03.2008 ella skjótast gjørligt**

**Vit bjóða dagrøktarar**
- Eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv
- Hollan pedagogiskan stuðul frá leiðsluni
- Skipað tilknýti til spælistovuna

**Vit vænta at dagrøktarar**
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- hava hug og áræði at skapa ein tryggan og mennandi gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum
- hava góðar umstøður at ansa børnum inni og uttanfyri

**Setanarviðurskifti**
Økispedagogur/spælistovufólk verður sett eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommununala Arbeiðsgevarafelag Føroya.
Dagrøktarar eru løntir eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Ein triðingur av lønini verður roknaður sum útreiðslur í sambandi við dagrøktina og er tí skattafríur.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til dagrøktarleiðaran á tlf.44 85 94 ella 22 85 94

**Umsókn**
Skrivlig umsókn skal verða Runavíkar kommunu í hendi í seinasta lagi 29. januar. kl. 12.00

**Runavíkar Kommuna**
**Heiðavegur 26**
**Postrúm 139**
**610 Saltangará**



# VINNUØKI Á SANDVÍKARHJALLA TIL SØLU



Um hóskandi boð fæst verður við hesum byggibúgvið grundøki matr. nr. 1 os, Hoyvík, liggjandi á Sandvíkarhjalla, ið er til víddar 3541 m², lýst til sølu. Talan er um vinnuøki.

Áhugaði kunnu venda sær til Petur Even Djurhuus, advokat, ped@lawfirm.fo ella skrivaran kt@lawfirm.fo

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO
HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO

TORMÓÐUR DJURHUUS · JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD · JÓHAN J. LAMHAUGE
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR



# Reingerðar- og hjálparfólk

Søkt verður eftir fólki at gera reint í Landsmiðstøðini frá 1. mars 2008. Arbeiðstíðin til reingerðina er tilsamans 10 tímar um vikuna, vanliga týsdag, hósdag og fríggjadag eftir klokkan 16.

Harumframt er møguleiki fyri, at viðkomandi kann hjálpa til við øðrum praktiskum arbeiði í húsinum, eitt nú í sambandi við skeið, sum Landsmiðstøðin skipar fyri.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Petur Simonsen, stjóra, á tlf. 356850.

Umsóknir skulu verða Landsmiðstøðini, Hoyvíksvegur 72, Postboks 3084, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mikudagin 30. januar 2008.

www.lms.fo Landsmiðstøðin LMS

**Landsmiðstøðin** er stovnur undir Mentamálaráðnum, sum veitir tænastur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarmiðlar, veitir fakliga og námsliga ráðgeving, skipar fyri eftirútbúgving av lærarum og hevur námsligan verkstað.



Sosialurin -har tað hendir




**Góða Fríðbjørg**
Hjartaliga tillukku við tí runda føðingardegi í morgin. Vit gleða okkum at koma norð. Alt tað besta ynskja vit tær í framtíðini.
**Kærar heilsanir mamma og pápi**



**Góðu Andrias, Jónas og Eva**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum. Góði Elias, tillukku við navninum. Vit elska tykkum.
**Heilsan omman og abbin í Mannbrekku**



**Góðasta Barbara**
Hjartaliga tillukku við 6 ára føðingardegnum. Vit gleða okkum at fáa kaku frá tær. Alt tað besta.
**Ynskja gubbi, Sigursól og Filip**



**Góða Barbara**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum 20. jan. Jesus pápi verði hjá tær.
**Ynskja mamma, babba og Rebekka**



**Góða fitta Birgit**
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum 16. jan. Jesus pápi signi framtíð tína. Vit elska teg.
**Heilsan mamma og pabba**